## Jón Brian um fartelefonir

Fartelefonin er eitt hent amboð, sum á ein hátt hevur gjørt samfelagið minni, men kanska eisini eitt sindur meira stressandi. Eg kenni meg eitt sindur naknan, um eg ikki havi fartelefonina hjá mær.



## Jón Brian um grindadráp

Tú kanst ikki byggja eitt samfelag upp á ein gamlan sið, men grindadráp er í lagi, so leingi tað ikki ger meira skaða enn gang fyri føroyska samfelagið.

# ann fær eitt svar



*- Tað fellir mær mest natúrligt at tosa á sama hátt í útvarpinum, sum eg geri í tí dagliga. Tað hevði virkað kunstigt, um eg royndi at tosa á ein annan hátt, enn eg geri vanligt, sigur Jón Brian Hvidtfeldt, fuglfirðingur í Útvarpinum. Mynd: Jens Kr. Vang*

journalistikkurin er ein týðandi partur av einum vælvirkandi samfelagi.

- Eitt samfelag, har tú ikki kanst seta kritiskar spurningar, er eitt sjúkt samfelag, og ein av uppgávunum hjá fjølmiðlunum er at seta spurningar við tað, sum til dømis politikarar gera. Tað er ikki uppgávan hjá okkum bara at fortelja fólki, at í dag var landsstýrismaðurin til arbeiðis. Vit mugu røkka longur enn tað og seta spurningar við tær avgerðir, sum politikararnir taka.

- Við hvørt verður hetta lagt út, sum at vit bert fáast við tað negativa, men tað er okkara skylda at seta spurningar við tað, sum fer fram í samfelagnum og lata fólkini, sum hava ábyrgd, svara hesum spurningum, sigur Jón Brian.

### Spyrja upp í saman

Við hvørt er tað neyðugt hjá einum útvarpsmanni at verða áhaldandi, tá ið hann vil hava svar upp á sínar spurningar, og tað hoyrist javnan í beinleiðis útvarpspráti, har journalisturin tráspyr ein politikara ella annan framstandandi persón.

- Tað er umráðandi hjá einum útvarpsmanni at verða væl fyrireikaður til eitt beinleiðis interview í eini tíðindasending ella aðrari sending. Tú skalt vita, hvat tú ætlar tær at spyrja um, og helst eisini vita, hvat gesturin fer at svara. Tú skalt geva fólki møguleikan at svara og lurta eftir tí, sum tey siga.

- Hinvegin kann eg ikki lata ein politikarar tosa uttanum fyri at sleppa undan at svara mínum spurningum. Tá kann við hvørt verða neyðugt at bróta fólk av og spyrja uppaftur fyri at ein spurning svaraðan. Vanliga ræður um at verða fólkaligur, men um fólk sjálvi eru ófólkalig og ikki svara tínum spurningum, so mást tú geva teimum eitt ordiligt mótspæl.

Jón Brian heldur, at tað ræður um at spyrja røttu spurningarnar og ikki verða órímiligur mótvegis fólki, men viðhvørt er neyðugt at fara í beinleiðis dyst við ein politikara.

- Tað er einki endamál í sær sjálvum at steikja fólk fyri opnari mikrofon, og teir smartastu spurningarnir eru ikki altíð teir bestu, men tað eru ávísar støður, har fólk helst vilja sleppa undan at svara kritiskum spurningum, og tá er neyðugt at spyrja upp í saman fyri at fáa eitt svar til tað, sum fólk vilja hava at vita, sigur hann.

### Málburðurin

So venda vit aftur til málburðin – dialektina – hjá Jón Briani Hvidtfeldt. Millum havnfólk, suðuroyingar, norðoyingar og aðrar føroyingar í útvarpinum, er hann ein einsamallur fuglfirðingur, og tað hoyrist aftur, tá ið hann situr við mikrofonina.

- Tað fellir mær mest natúrligt at tosa á sama hátt í útvarpinum, sum eg geri í tí dagliga. Tað hevði virkað kunstigt, um eg royndi at tosa á ein annan hátt, enn eg geri vanligt.

- Tað kemur fyri, at eg fái onkra viðmerking um fuglfjarðardialektina hjá mær, men tað er mest í skemti – og í Fuglafirði halda summi fólk, at tað ljóðar sera vakurt, sigur Jón Brian við einum smíli.

- Útvarpið er fjølbroytt og fyri allar føroyingar, og tí er eisini rúmd fyri flestu dialektunum. Hetta avspeglar málið í samfelagnum, og tað er ein stór styrki fyri Útvarpið. Eg ætli mær ikki at broyta mína dialekt, um eg ikki fái boð um tað, og tað rokni eg ikki við at fáa, sigur Jón Brian.

## Fakta

**Navn:** Jón Brian Hvidtfeldt
**Aldur:** 29 ár
**Bústaður:** Hoyvík
**Útbúgving:** Journalistur frá Danmarks Journalisthøjskole í 2004
**Starv:** Journalistur í Útvarpinum